Fyrisagnir

LANDSROYNDIN

11. mai 1983 kl. 9⁰⁰—10⁰⁰

FØROYSK FYRISØGN

(Fyrisøgnin verður fyrst lisin fyri næmingunum. So verður fyrisagt tvær ferðir, 3—4 orð í senn. Av teknum verða bert punktum lisin, og reglubrot verða tilskilað).

Á skarvaveiðu.

Fyrst í juni plaga menn at fara eftir skarvsungum. Ofta verður farið um náttina, men ikki er neyðugt at hava ljós við sær, tí tá er so mikið ljóst, at tú sært at lesa bók um midnáttina.

Tann ungi skarvurin heldur til inni við strondina ta fyrstu tíðina, og hvørja nátt fer hann upp á land at sova. Altíð setur hann seg á helluna heilt niðri við sjógvin, og gamalt er, at hann skal sova ógvuliga fast. Tí verður hann róptur svøvnskarvur.

Beint eftir ólavsøku plaga menn at fara eftir svøvnskarvi. Farið verður í skýmingini, og rógva teir sera varliga fram við landi, har teir halda, at skarvur plagar at verða. Ikki ber til at sníkja seg fram á tann sovandi fuglin frá sjónum, tí hann vendir sær altíð móti havinum, og tí mega teir lúra seg sera stillisliga aftur um fuglin.

Tá ið skarvur svevur, stingur hann høvdið inn undir annan veingin. Hálsurin er so langur, at til ber at tríva um kroppin á honum og læsa høvdið so fast undir veingirnar, at tað ikki letur í honum, og tí kunnu teir kippa ein skarvin fyri og annan eftir, uttan at hinir, ið hjá standa, varnast nakað sum helst.

FRÁFARINGARROYND FÓLKASKÚLANS

mai-juni 2007

Føroysk fyrisøgn

(Fyrst verður fyrisøgnin lisin í síni heild, síðan verða eini 3-5 orð, sum tað hóskar, lisin tvær ferðir. Av teknum verða bara punktum lisin, og reglubrot verða tilskilað. Loyvt er næmingunum at brúka føroyska orðabók til royndina.)

Eg undraðist á, hví pápi læt hana fara avstað við klæðunum hjá mær. Hann gjørdi einki fyri at steðga henni. Hann tosaði blíðmæltur við hana, sum legði hann einki í, hvussu henda fremmanda konan fór við mær. Sum sá hann ikki, hvussu hon stjól alt frá mær, og sjálvur var eg so kløkkur um stuldurin, at eg tordi ikki at biðja hann hjálpa mær.

Tann hvíta konan stillaði meg í eitt fat við heitum vatni og fór at vaska mær frá høvur til fót, sum átti hon meg. Eg vildi ikki, at hon skuldi vaska mær, enn minni eiga meg, og royndi at sleppa yvir til pápa, ið stóð og bíðaði eftir mær, men hann lætst sum einki, hann legði einki í, um hon helt seg eiga meg. Hon helt fast í mær, fyri at eg ikki skuldi sleppa nakran veg, turkaði mær og læt meg í ein kjóla, sum var eg ein genta, og hann stóð bara og hugdi at øllum hesum skammiliga, sum hendi mær. Kjólin var líka so hvítur sum hennara, men eg var ein drongur, eg vildi ikki vera nakað so vanæruligt sum ein genta, ikki talingur um, so eg stríddist ímóti alt tað, sum eg orkaði.

Ikki fyrr enn nøkur ár seinni skilti eg, at eg varð førdur á sjúkrahúsið í Havn, har eg varð lagdur undir skurð fyri brokk. Í tvær vikur lá eg bundin við einum tungum posa oman á skurðinum, so at hann skuldi fáa frið at grøða saman.

(Brot úr skaldsøguni "Í andgletti" (1988) eftir Jens Paula Heinesen, tillagað)

FRÁFARINGARROYND FÓLKASKÚLANS
mai - juni 1998

Føroysk fyrisøgn

(Fyrst verður fyrisøgnin lisin í síni heild, síðan verða eini 3-5 orð, sum tað hóskar, lisin tvær ferðir. Av teknum verða bert punktum lisin, og reglubrot verða tilskilað).

Lisa sat hond upp undir kinn og stardi út gjøgnum vindeygað á kamari sínum. Hon stóð og hugsaði um mammu sína, sum var vorðin sjúk í øðrum eyganum. Hon hevði gingið til lækna í eina tíð; men tíverri, nú kundi hann ikki hjálpa henni longur, tí tað hevði tikið ilt fyri seg. Eygað sá ræðuligt út, tað var hovið og reytt, og roðin var farin at breiða seg niður á kjálkan. Hon var ikki erkvisin, mamma hennara; men hon hevði ilt, tað sóu tey týðiliga. Nú mátti okkurt gerast, og læknin, ið hon hevði gingið til, hevði tí tikið ta avgerð, at einastu ráðini vóru at fara á Ríkissjúkrahúsið í Keypmannahavn at fáa viðgerð, skuldi hon ikki missa eygað.

Um fáar dagar fór Tjaldrið niður, og við tí mátti mamman fara. Ikki kundi drálast longur. Vetrardagur var, og skipið sigldi bara fáar ferðir hesa ársins tíð. Í gjár hevði pápin verið og keypt ferðaseðil, og eisini hevði hann verið á sýsluskrivstovuni og biðið um ferðapass, tí tað kravdist, nú ið kríggið leikaði sum harðast.

Fyri góðum mánaði síðani, tann 3. september, var kríggj brostið á millum Týskland og Bretland. Tað hevði leingi verið væntandi; men øll høvdu vónað til seinastu løtu, at friðurin kundi varðveitast. Men henda vónin brast.

Lisa hvakk við, tá ið kamarshurðin brast upp.
"Her situr tú," segði Mia, systir hennara, "hvat gert tú?"
Lisa vendi sær á, og tá sá Mia, at hon hevði grátið.
"Eg eri so kedd, tí at mamma noyðist at fara av stað. Hví kann hon ikki bara fara á hospitalið í Havn?"
"Lurta, Lisa góða, tú veitst, at eingin eygnalækni er í Havn, og tú vilt ikki, at mamma skal missa eygað?"

FRÁFARINGARROYND FÓLKASKÚLANS
mai – juni 2002

Føroysk fyrisøgn

(Fyrst verður fyrisøgnin lisin í síni heild, síðan verða eini 3-5 orð, sum tað hóskar, lisin tvær ferðir. Av teknum verða bert punktum lisin, og reglubrot verða tilskilað. Orðini *íður* og *fláir* verða stavað fyri næmingunum).

Úr øllum húsunum sæst havið. Tað streymar við strendurnar, lyftir seg spakuliga og søkkur aftur í firðunum, rekur gjøgnum sundini, tekur seg út um sjónarringin og kemur so aftur sum mjúkar aldur inn á sandarnar ella sum grovmælt dun móti berginum. Tað er sjógvur, ið er komin langa leið, og nú liggur hann og floytir sær útiá eftir drúgva ferð.

Streymar ganga hvør móti øðrum og skræða felags rendur sundur, ein breið ál tykist at kulsast og fáa gásarhold, nú eitt vindblak kastar garðar niður í sjógvin, spruttini standa uppfrá sum sprongdir skyggjandi dropar. Inni undir landi taka streingir seg burturúr, venda við og vilja sleppa út aftur í leikin, *íður* draga saman, ein móti aðrari, tær fara at klandrast, til ein meldur svølgir báðar og hvørvir við teimum niður í svørt dýpi. Bond og *fláir* leggja seg hvørt inn undir annað ella troka seg uppum, meðan sjóvarfallið slotar og ætlar sær undir at skifta kós longri úti.

Tann stóri Golfstreymurin er ein ómetalig á, sum rennur gjøgnum meginhøv av køldum vatni, ein slanga av hita gjøgnum havsins ørgrynnur av sjógvi. Tann endaleysa fløtan, sum eygað sær, er bara tann uttasta tunna skónin, og undir henni eru øðrvísi álvarsamir máttir. Teir hava streymað leingi og virkað nógv á leiðini hendan vegin, og tað er, sum eru hesir klettar og hesar oyggjar komin her at standa av tilvild.

(Úr greinini "Havið um húsini" eftir Gunnar Hoydal, tekstasavnið "Land í sjónum" 2001)

Skrivlig prótvøka, 9. flokkur
26. mai 2015

Føroysk fyrisøgn

(Fyrst verður fyrisøgnin lisin í síni heild, síðan verða eini 3-5 orð, sum tað hóskar, lisin tvær ferðir. Av teknum verða bara punktum og rópitekn lisin, og reglubrotini verða tilskilað. Tað er næmingunum loyvt at brúka føroyska orðabók til prótvøkuna.)

Fólk tyrptust saman / uttan um húsini / hjá okkum, / tí nú var kunnugt, / at Eli var komin við brævi. / So kom róp í, / og tað loypti / hvøkk á hini. / Tá fór alt út á geilar, / og tún vóru avtakin. /

Tann morgunin / var eg heima. / Fór ikki í skúla. / Ovmikið var / kortini at gera, / tí eg skrivaði brævið av / saman við Ívari. / Eitt avrit varð sent / til hvørt nám, / so eftirlitsmenninir / kundu lesa brævið / fyri arbeiðarunum, / og teir vórðu bidnir / at koma til fundar / saman við pápa, / tá ið hann kom aftur / kvøldið eftir. /

Tíðindi um, / at verkfallið var avblást, / komu sum fjarrit / um fimmtíðina sama seinnapart. / Nøkur fá orð / skrivað við blýanti, / men fólkini høvdu / neyvan verið fegnari, / um tað var Guð[1] sjálvur, / ið við egnum fingri / hevði skrivað á veggin. /

Um sjeytíðina, / tá ið tað var vorðið myrkt, / kom ein stórur vognur / koyrandi eftir vegnum / og niðan eftir gøtuni, / har hann steðgaði. / Fólk var farið til hús, / tí nú kavaði. /

Úr: "Grønur var dalurin" eftir Richard Llewellyn

[1] Guð / Gud – báðar stavsetingarnar eru loyvdar

FRÁFARINGARROYND FÓLKASKÚLANS
mai - juni 1999

Føroysk fyrisøgn

(Fyrst verður fyrisøgnin lisin í síni heild, síðan verða eini 3-5 orð, sum tað hóskar, lisin tvær ferðir. Av teknum verða bert punktum lisin, og reglubrot verða tilskilað. Slómaði verður stavað fyri næmingunum.)

Summarkvøld

Vit vóru og leitaðu eftir einari dunnu, Diddan og eg. Tað var liðið so nógv út á summarið, at tjøldrini høvdu fingið ungar, og stararnir lógu aðru ferð. Tann gráflekkuta dunnan var órein, tá ið so langt var útliðið, og smoygdi sær altíð burtur um kvøldini og steggin við henni. Eg gav honum skyldina, men Harrin viti, um tað ikki var hon, ið dró hann við sær. Tí tá ið eg hugsi meg um, var tað altíð hon, sum var á odda, hann gekk mest og slómaði aftaná.

Vit høvdu leitað nakað leingi, Diddan og eg, men einki vit høvdu funnið. Nú vóru vit komin oman at ánni, sum rann spakuliga í mjúkum bugum eftir slættanum. Tað var so seint á kvøldi, at seyðurin var farin at leggja seg á ból uppi á høvdunum, summstaðni dagaði onkur upp ímóti luftini og stóð og bíndi dovisliga vestureftir.

Tað plagdi at yðja av sílum niðri í ánni, men í kvøld sóust tey ikki. Vatnið var so svart og djúpt. Diddan spurdi, um tey svóvu, og hvussu tey svóvu, um tey lógu á rygginum ella á búkinum. Eg visti ikki rættiliga, men lætst at vera klókari enn hon og svaraði, at tey lógu á liðini.

Niðri við Rockall steðgaðu vit. Hetta er ein stórur steinur, sum stendur út úr áarbakkanum og gongur út í dýpið. Maður grynnir valla niður við honum.

(Úr "Summarkvøld við Rockall" eftir Karsten Hoydal)

FRÁFARINGARROYND FÓLKASKÚLANS
mai - juni 1997

Føroysk fyrisøgn

(Fyrst verður fyrisøgnin lisin í síni heild, síðan verða eini 3-5 orð, sum tað hóskar, lisin tvær ferðir. Av teknum verða bert punktum lisin, og reglubrot verða tilskilað).

Tað var eitt vetrarkvøld í einari miðalstórari bygd í Suðuroy. Eftir bygdargøtuni komu nakrar konur gangandi. Tær høvdu verið og vitjað við stokkum inni í einum húsum, sum vanligt plagdi at vera tá í tíðini. Teirra millum var ein tólv ára gomul genta, sum eisini hevði sitið og bundið og lurtað væl eftir tí, tey vaksnu høvdu tosað um. Nú fylgdist hon við mammu síni og helt í armin á henni.

Brádliga síggja móðir og dóttir nakrar menn í oljuklæðum koma ímóti sær, seks í tali. Tær kendu ongan teirra, men móðirin skilti beinan vegin, at hetta mundi vera ein bátsmanning, ið tær sóu fyri sær. Hinar konurnar sóu helst einki, tí tær lótust ikki um vón.

Tá ið menninir vóru áraka tær, bað mamman dóttrina sleppa arminum á sær, og hon so gjørdi. Tá sóu tær ongar menn longur.

Tær vistu sjálvandi ikki, hvat ið hetta hevði at týða, og tær kendu heldur ikki hesar menninar; men ta náttina lógu tær leingi í andvekri, tí at hetta var fyrstu ferð, tær høvdu sæð yvir seg.

Fáar dagar seinni sóu tær í bløðunum, at ein útróðrarbátur var gingin burtur norðanfjørðs júst henda dagin, og allir menninir sjólótust. Tær hugsaðu tí, at tað var hesa somu bátsmanningina, tær høvdu sæð í hamferð hitt kvøldið.

Jú, mangt er ímillum himmal og jørð.

FRÁFARINGARROYND FÓLKASKÚLANS

mai-juni 1988

(Fyrst verður øll fyrisøgnin lisin upp. Síðan verða eini trý til fimm orð - sum tað hóskar - lisin tvær ferðir. Av teknum verða bert punktum lisin, og reglubrot verða tilskilað. Tá ið fyrisøgnin er liðug, er næmingunum loyvt at nýta orðabók at rætta eftir).

FØROYSK FYRISØGN

(60 minuttir)

Dansitíðin var millum jóla og føstu. Tá dansaðu tey hvørt sunnukvøld. Børn sluppu at dansa, áðrenn tey vaksnu komu.

Tann, ið byrjaði eina vísu, skipaði. Tað vil siga, at hann byrjaði hvørt ørindi, og um onkur annar tók at skipa, høvdu tey á máli, at hesin dugdi ikki dansisið.

Glapp tað fyri einum, sum skipaði, kundi henda, at hann bað ein annan skipa, og tað var ikki skomm. At taka vísuna av einum øðrum, tað vil siga, at onkur fór undir aðra vísu, áðrenn vísan, tey kvóðu, var liðug, var stór skomm.

Dansifólkið livdi við í kvæðum og vísum. Hetta sást so týðuliga á eygnabránum og øllum kroppinum, meðan tey dansaðu. Varð kvøðið um kappabrøgd, snaraðu tey sær á hvør til annan, tóku fastari í hondina hvør á øðrum og stigu fastari á gólvið.

Byrjað varð at dansa við at seta vinstra bein fyri og toyggja á eitt sindur, tá ið ørindið var endað, so at altíð varð byrjað á sama fóti.

Fyri at eitt kvæði ella ein vísa ikki skuldi gerast fótatraðk, sum tey plagdu at siga, kvóðu tey hetta kvæðið ella hesa vísuna bert eina ferð um árið. So mikið nógv kvæði og vísur dugdu tey. Kvæðini tóktu teimum vera ov góð og at minka í virði, um tey vórðu kvøðin upp í saman.

FRÁFARINGARROYND FÓLKASKÚLANS

November-desember 2005

Føroysk fyrisøgn

(Fyrst verður fyrisøgnin lisin í síni heild, síðan verða eina 3-5 orð, sum tað hóskar, lisin tvær ferðir. Av teknum verða bara punktum og tankastrika lisin, og reglubrotini verða tilskilað. Orðini fjølmiðlarnir, hugburð og Tøkniligu verða stavað fyri næmingunum, so hvørt sum tey verða skrivað. Tað er næmingunum loyvt at brúka føroyska orðabók til royndina.)

Mangan verður havt á orði, og tað verður spurt, hvussu mikið *fjølmiðlarnir* ávirka okkum øll, og hvussu mikið teir ávirka samfelagið, vit øll eru ein partur av.

Latið okkum siga, at ein stórur partur av fólkinum í landinum broytir hugsan, *hugburð* og atferð eftir tí, sum tey síggja, hoyra og lesa í fjølmiðlunum. Mong munnu hava sæð og hava ásannað, at sovorðið kemur fyri í mótaheiminum. Lýsingar í sjónvarpi, bløðum og vikubløðum ávirka fólk, so at tey til dømis fara at lata seg í eftir tí nýggjasta mótanum.

Ungdómurin fer fjølmentur at fáa sær ringar í oyruni, í nøsina ella aðrastaðni. Hópurin av vaksnum fólki fær sær nýggjar vanar, fer til dømis at súkkla, at renna ella at ganga langar túrar í staðin fyri at koyra í bili, summi fara at eta vistfrøðiligan ella grønan mat – og so framvegis.

Tøkniligu framstigini og menningin í samskifti hava gjørt tað møguligt at flyta vitan og mentan á nýggjan hátt.

Nógv broyttist, tá ið útvarpið í síni tíð kom, og hvørt hús kundi sita og lurta eftir frásøgn frá kappróðri, frá fótbóltsdysti ella tónleikasending í somu løtu, sum hesar hendingarnar fóru fram aðrastaðni í landinum.

Síðan tá er almikið broytt, nú ið sendingar sum Ársins songrødd og aðrar slíkar verða sendar beinleiðis í sjónvarpinum. Ikki um at tala alt tað, amboð sum telda og fartelefon longu duga – og fara at duga um stutta tíð.

(Brot úr "Samfelagsfrøði 1" eftir Petur Ova Petersen – tillagaður tekstur)